# Tjalding á festivalinum



## Góðir møguleikar verða hjá teimum, sum hava hug at taka tjald við og gista á Fjarðafestivalinum

GISTING
*Oddur á Lakjuni*
*planet@sosialurin.fo*

Eitt stórt øki er lagt av til tjalding, húsbilar og kampingvognar.

Norðan fyri Kelduna er ein rætt, og beint norðanfyri hesa rættina er ein stór fløta, sum Fjarðafestivalurin hevur fingið loyvi til at nýta sum tjaldingarøki. Hetta er beint við festivaløkið; tað eru einans nakrir fáir metrar at ganga ímillum Kelduna og tjaldingarplássið.

Hetta er eitt vakurt og hugnaligt øki við eini á, sum rennur beint ígjøgnum. Terje Vestergaard, fyrireikari, sigur, at plássið á tjaldingarøkinum er mestsum óavmarkað.

– Her trýtur ikki pláss. Fólk kunnu fara heilt niðanum hamaran, um tey hava hug.

### Parkering til húsbilar

Beint hinumegin rættina nærri sjálvum festivaløkinum, er eitt parkeringsøki sett av til húsbilar og kampingvognar. Har verður gott pláss til bilarnar, sum so koma at standa heilt nær festivaløkinum. Fleiri hava umbiðið sær pláss til vognar í ár.

Sjálv rættin, sum liggur í millum tjaldingarplássið og plássið til vognar, verður eisini tikin í brúk. Rættin verður ruddað og sópað, og tjøld verða sett upp inni í henni. Borð verða eisini sett upp, og har verða góðir møguleikar at gera sær mat og at vera saman hjá teimum, sum gista í økinum.

Í fjør vóru tað rættiliga fá, sum gistu á tjaldingarplássinum, sigur Terje.

– Í ár fara vónandi fleiri at gera brúk av frálíku umstøðunum, sum vit hava til tjalding her á økinum. Her er nokk av plássi og tað liggur væl fyri.

## Myndlist á Fjarðafestivalinum

Eins og í fjør verður myndlistin umboðað á Fjarðafestivalinum. Á framsýningini í ár hevur festivalurin fingið bæði roynd listarfólk, so sum Oggi, Eli Smith og Edith Mørkøre og nýggjari spennandi nøvn sum Ruth Mohr í Grund og Astrid Mouritssen.

**nud**




Skalt tú byggja?

Vit veita betong til kappingarførar prísir – nær sum helst og hvar sum helst. Einki er ov lítið ella ov stórt. Okkara fyrstafloks betongframleiðsla er stýrd við framkomnari tøkni, og vit veita betong til øll endamál. Skjótari og betri gerst tað snøgt sagt ikki.

Articon P/f, á Hjalla 20, Hoyvík - Tel.350 710

ARTICON